**Bárður Larsen, medritstjóri**

# Máti og endamál við stjórnarlóg

Eisini henda útgávan av ritinum verður merkt av ráðstevnuni frá mars í ár um grundlógarsmíð og stjórnarrættarlig viðurskifti. Tá var nógv og gott tilfar latið inn, sumt vælegnað sum greinar í ritinum. Men samstundis er eisini henda útgávan merkt av, at arbeiðið at smíða eina føroyska stjórnarlóg (grundlóg) fer í gongd aftur ein av fyrstu døgunum. Tískil er tað av størsta týdningi at viðgera spurningin, hvat endamálið er við eini stjórnarlóg.

Hesuferð er greinar komnar frá teimum trimum professarunum og doktarunum í løgfrøði, norska Eivind Smith, svensku Caroline Taube og amerikanska Mark Tushnet. Samstundis er tað ikki at taka munnin ov fullan at siga, at høvundarnir hesuferð eru higartil kendastu og mest virdu nøvn innan fakøkið stjórnarlóg (statsrætt), sum hava skrivað í lógarritið. Eisini er at fegnast um, at nýtt frá fyrisitingini er við aftur hesu ferð, og vænta vit, at tað verður fastur táttur framyvir.

Mark Tushnet er ein av teim leiðandi í USA innan stjórnarlóg og er eisini eitt av nøvnunum, sum næstan altíð kemur upp at venda í altjóða høpi, tá ið ræður um samanborna stjórnarlóg (*Comparative Constitutional Law*). Í grein síni (*New Constitutions in Light of Globalisation*) hugleiðir Tushnet um nýggjar stjórnarlógir í ljósinum av altjóðagerð.

Tushnet ger vart við, at altjóðagerð (globalisering) hevur tvær mótgangandi avleiðingar við sær fyri stjórnarlógarskipanir (ella ”konstitutiónalismu”). Fyri tað fyrsta kunnu lokalu eindirnar (ríkini og tær ríkislíku eindirnar) ikki longur á sama hátt regulera tey øki, sum tær fyrr kundu. Nú er vald í ávísan mun “tikið” úr hondunum á lokalu eindunum og “lagt” yvir til millumtjóða aktørar. Men fyri tað næsta sigur hann eisini eina avleiðing av einum altjóðagjørdum heimi vera, at tað verður av enn størri týdningi hjá teimum lokalu eindunum at skapa sterkar stjórnarlógir at byrgja upp fyri “trýstinum” frá millum- ella altjóða aktørum, sum ofta ikki hava sama demokratiska rætt (legitimitet) sum lokalu eindirnar. Harumframt heldur Tushnet, at altjóðagerð ger tað umráðandi, at lokalu eindirnar menna stovnar (institutiónir), ið kunnu hjálpa fólkinum at fata seg sjálvi sum partur av serstakari tjóð.

Her rakar Tushnet eisini beint á spurningin, hvat endamálið er við eini stjórnarlóg. Tað er jú so, at stjórnarlógir ofta eru við at skapa karmar um ein felags identitet

og felags virði og ikki bert, sum verandi føroyska stýrisskipanarlóg, ein reglugerð fyri politisku skipanina og stovnar hennara.

Greinin hjá Caroline Taube viðgerð smíðið av stjórnarlógum í baltisku londunum, nú hesu fingu fullveldi eftir endan á kalda krígnum. Henda grein er áhugaverd, tí hon vísir á trupuleikan við stødd (fólkatali) hjá hesum londum og teir trupulleikar, tað kann hava við sær - so sum ógegni og førleika hjá dómarum - og møguligar loysnir í hesum sambandi. Her er avgjørt okkurt hjá okkum føroyingum at læra av.

Eivind Smith letur greinina ”Grundloven som lov og som symbol”. Hon snýr seg um grundleggjandi spurningar um endamálið við stjórnarlóg, dómstólaroynd og stjórnarlóg sum part av vanligu rættarskipanini.

Eivind Smith er lýstur sum fremsti verji í norðanlondum av hugsjónini um konstitutiónelt demokrati. Í hvussu er hevur ongin norðurlendingur skrivað so nógv og væl um hetta evnið sum Eivind Smith. Hugsjónarliga er Smith ikki at finna millum tey mongu sum halda, at stjórnarlógir hoyra heima í eini skuffu. Heldur er hann fyri, at dómstólarnir aktivt brúka stjórnarlógir eins og aðrar lógir. Hesum sjónarmiðum hevur hann greitt frá í sínum mongu arbeiðum, ið oftast hava snúð seg um *dómstólaroynd* - hvørt og í hvønn mun dómstólar skulu hava rætt til endaliga at tulka stjórnarlógir. At dómstólaroynd er møgulig í eini skipan, kann sigast at vera avgerandi fyri, um stjórnarlógin veruliga verður partur av vanligu rættarskipanini (”den positive rett”) ella mest eitt slag av hugsjónarligari rammu hjá politisku skipanini, sum var ráðandi í Europa fram til nakað eftir 2. heimsbardaga.

Sambært Eivind Smith er ein effektiv stjórnarlóg eitt gott stýringsamboð fyri eitt samfelag. Hetta hjálpir til at skapa stabilitet og kontinuitet, sum ikki kunnu náast á sama hátt í skipanum, har evsti tulkandi myndugleikin av stjórnarlógini meira er hjá tinginum.

Av serliga stórum áhuga fyri føroysku støðuna er tað, tá ið Eivind Smith hugleiðir um ta ávirkan, ið ”*brudd*” ella ”*kontinuitet*” hava á støðuna hjá eini stjórnarlóg sum (tjóðar) ímynd (stjórnarlógir eru ofta týdningarmiklar ímyndir). Sambært honum, vil stjórnarlógin hava veikari støðu sum ímynd í teimum ríkjum, har framhaldið (kontinuiteturin) stendur sterkt í søguligu sjálvsfatanini. Hinvegin verður virðið sum ímynd oftast sterkt, tá ið stjórnarlógin stendur sum ein varði, ið sigur frá, at her er *brotið* við eldri virðir og tikið við nýggjum.

Síðan er tað upp til føroyingar at gera av, um talan er, ella skal verða, um *brot* ella *framhald*, tá ið nýggja føroyska stjórnarlógin kemur í staðin fyri stýrisskipanarlógina.